# Skerpikjøtsmekka og Tjóðarbranding

**Friðsæla, føroyskur dansur, grindardráp, homofobi, seyður, láturligt landslið eru orð í koma fram tá vit og onnur royna at lýsa Føroyar**

*Bogi Eliasen,*
*cand.scient.pol*
*be@implementer-ltd.com*



## Politikkur og ímynd

At heimurin er alheimsgjørdur merkir, at vit, um vit vilja tað ella ikki, eru ein samrunnin partur av heiminum. Lond kunnu so velja at fáa sum mest burturúr støðuni sum hon er, ella lata verða.

## Annað enn marknaðir

Vanliga hugsa vit um tann vinnuliga partin av alheimsgerðini, so sum betri marknaðaratgongd og at okkara vinnulív er á altjóða støði. Tað er sjálvsagt umráðandi at hava marknaðaratgongd og at hava eitt vinnulív á altjóða støði. Men krøvini eru onnur eisini. M.a. at gera vart við at ein er til í heiminum.

## Boðskap

Fyri at sleppa framat er neyðugt at hava ein boðskap, eina ímynd, okkurt sum fangar minnið hjá fólki, og at henda ímyndin eisini onkursvegna speglar føroyska veruleikan.

At marknaðarføra Føroyar sum skerpikjøtsmekka heimsins er neyvan nakað, sum gevur okkum tann stóra vinningin. Tað skal verða eggjandi at samstarva við Føroyar. ”

Vit skulu verða ”the edge”, “creme de la creme”

Um vit skulu marknaðaføra okkum sum tað besta, krevur tað eisini at vit arbeiða fram ímóti, at vit gerast tey bestu, tí at marknaðarføra uttan at veruleikagera málini, er ikki nóg mikið og í besta føri láturligt.

## Góð við okkum

Tað krevur eina góða ímynd av bæði almennu Føroyum, vinnulívinum og Føroyum sum eind. Tað hava vit ikki. Tað krevur eisini at vit eru góð við okkum sjálvi, og trúgva uppá egnan mátt, tað gera vit heldur ikki.

## Tørvur

Tjóðarbranding kann verða lívsneyðug og avgerðandi fyri at fáa íløgur til landið. T.d. hava almennu Føroyar oftani havt trupulleikar av, at ov fá vita at Føroyar eru til. Tað munnu eisini verða nógv atlas í heiminum har Føroyar ikki eru á.

Tørvurin á tjóðarbranding kemur tí at alheimsgerðin og harvið eisini ein heimur í frælsari kapping ger, at allur heimurin kappast hvør ímóti øðrum. Í hesi kapping er altavgerðandi at hava gott orð á sær, og serliga avgerðandi at hava gott orð á sær á teim vinnuøkjum landið livir av.

## Munurin

Og júst har er avgerðandi munur og virkisbranding og tjóðarbranding. Tú kanst ikki bara keypa tær ein lýsingaherferð. Ella tað kanst tú, men tú fært neyvan nóg nógv fyri pengarnar.

Føroyar eru stemplaði sum fundamentalir homofobar í norðanlondum, ein falskur grindafilmur svimur á netinum, og vit eru umhvørvissvín sum ikki vilja seta í gildi Kyotosáttmálan. Well, okkurt er helst um tað halda í hvussu so er fleiri og vit hava einki at svara aftur við.

## Felags virðir

Tjóðar-branding snýr seg í stóran mun um at finna felags virði í einum samfelag og so fáa alt samfelagið at samstarva um at fáa hesi virðir fram og miðvíst arbeiða við at uppbyggja eina positiva føroyska ímynd úti í heimi. Hetta skal bæði gagna okkara vinnulívi, men so sanniliga eisini okkara almennu- og politisku skipan, tá hon samráðst úti í heimi.

Tjóðarbranding snýr seg um langtíðarætlanir og miðvíst arbeiði við at finna og brúka føroysku virðini úteftir, men krevur eisini at allir samfelagspartar leggja orku í eitt slíkt samstarv.




# Prísvøkstur løgna ávirkan

MARKNAÐARRÁK

Stórur spenningur var í farnu viku í marknaðunum, tá prísvøksturin bæði í USA og Evropa varð kunngjørdur. Íleggjarar eru í iva um, hvat tjóðbankin í USA, Fed, fer at gera við rentuna. Fed hevur hækkað rentuna 4,25%-stig síðan 2004, men hækkingarnar eru nú steðgaðar. Um Fed fer at lækka rentuna, stuðlar hetta vanliga undir bæði láns- og partabrøvum. Fed sigur mest óttan fyri prísvøkstri vera orsøkina til hækkingarnar. Tí nýtir marknaðurin prísvøksturin sum eitt barometur fyri komandi rentugongdini, og tískil eisini væntaðu gongdini á virðisbrævamarknaðunum. Prísvøksturin báðu megin Atlantshavið varð væl lægri enn væntað, eisini frároknað olju og matvørur. Tað løgna var, at hvørki lánsbrøv ella partabrøv lótu serligt við seg koma. Hetta kann benda á, at íleggjarar fara at hyggja at øðrum enn prísvøkstrinum komandi tíðina.

## Lánsbrævarentur

Aftur hesa vikuna vóru lánsbrævarentur støðugar. 10-ára rentan er 3,75%, og hon er sostatt 0,25%-stig lægri enn 1-árs rentan. Í november hevur 10-ára rentan hildið seg millum 3,75%-3,86%.

## Vestas kunnger roknskap

Vindorkufelagið Vestas kunnger roknskap fyri 3. ársfjórðing mikudagin. Kaupthing metir at útlitini hjá Vestas sum heild eru góð komandi árini. Tó vilja framvegis veitingartrupulleikar frá undirveitarum koma fyri summar ársfjórðingar og hetta kann minka um vinningin. Kursurin er hækkaður X% síðan september. Hóast langtíðar útlitini eru góð, meta vit at møguleikin fyri kurshækking í stutta tíðarbilinum er avmarknaður.

## Hesa vikuna

Evropa fer at seta dám á hesa komandi vikuna, serliga Týskland. Higani verða kunngjørd bæði álitistøl, búskaparvøkstur og prísvøkstur. Týskland er størsti búskapurin í Evropa, og tí fer hetta at ávirka evropisk partabrøv undir einum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 582,86 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 4,93 | 0,0% | → |
| GBP | 1.100,58 | -0,6% | ↓ |
| NOK | 90,29 | -0,6% | ↓ |
| SEK | 82,39 | 0,4% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,61 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 121,12 | 0,0% | → |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 588,50 | -0,1% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,64 | 0,2% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Vika 47*